StÍF-Stjørnan 17-22 (8-14):

# Stjørnan hongur í oddinum

**Við sigrinum á StÍF helt Stjørnan fast um triðja plássið á stigatalvuni, har tær bert eru eittans stig aftan fyri oddaliðið**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Hóast tað undan kappingarárinum sá ógvuliga svart út hjá Stjørnuni, so hevur gongdin higartil givið teimum alla orsøk at fegnast, nú tær bert eru eitt stig aftan fyri oddaliðið, tá farast skal undir endaspælið*

Tað var bronsudysturin í grundspælinum, tá StÍF sunnudagin tók ímóti Stjørnuni. Gaman í verða heiðursmerki ikki latin fyri plaseringarnar í grundspælinum, men fyri vánirnar víðari í kappingini hevði dysturin sunnudagin alstóran týdning fyri liðini bæði.

StÍF hevur stóran part av kappingarárinum verið millum teirra, sum hava elt oddaliðið úr Vági, men seinastu viku mistu tær eitt týðandi fet í hesum, tá tær á heimavølli máttu lúta fyri Kyndli.

Hjá Stjørnuni hevur gongdin hinvegin verið ein heilt onnur. Fyrstu umførini tóktust døpru spádómarnir hjá klaksvíkingum at halda. Spádómar um, at talan fyrst og fremst fór at verða um at stríð at halda liðnum í deildini. Spakuliga hevur liðið tó ment seg, og verður sæð burtur frá dystinum í Vestmanna – tá leikandi venjarin eisini var burturstødd – so hevur talan verið um støðugt góð úrslit alla seinnu helvt av grundspælinum. Og hetta hevur eisini speglast aftur á stigatalvuni.

## Løgdu sjógv ímillum

Og tað var eisini rættiliga skjótt, at áskoðararnir til dystin sunnudagin máttu ásanna, at her skuldi tað verða Stjørnan, sum var við yvirlutan. Liðið hevur fyri stuttum fingið Báru Skaale við aftur á liðið, og saman við útlendsku leikarunum hevði hon skjótt syrgt fyri eini lítlari leiðslu. Tá tað samstundis gekst meira enn striltið hjá strandingum at fáa bóltin inn um væl spælandi Agne Masinetie í Stjørnu-málinum, tóktist tað leingi so, at Stjørnan barasta økti um munin, men spakuliga kom StÍF tó alt meira við aftur í dystin.

Heilt spennandi megnaður tær tó ongan tíð at gera dystin. Eitt skifti í seinna hálvleiki togaðu tær seg somikið nær, at bert trý mál vóru á muni, men tá Stjørnan so svaraði aftur við trimum á rað, samstundis sum StÍF ikki fekk gjørt sær dælt av drúgvari yvirtalsstøðu, var alt líka sum avgjørt.

## Øgiligt fyrsta umfar

Við sigrinum syrgdu klaksvíkskvinnurnar fyri, at tær nú eru ájavnar VÍF á øðrum plássinum, tá endaspæli fer í gongd. Ein støða, sum hevði verið fullkomuliga óhugsandi fyri tveimum mánaðum síðani, men sum nú kortini er veruleiki. Og tó at spælið hjá Stjørnuni okkurt ári hevur verið meira flótandi, enn tað er nú, so kann ikki sigast annað enn, at hetta er fult uppiborið. Bulurin á liðnum er sjálvandi tær útlendsku, men hartil hevur liðið í ár sýnt ein framúr góðan stríðsvilja. Fleiri ferðir hevur uppgávan sæð mest sum vónleys úr, men kortini hava tær strítt seg til stig, og hetta er ein avgerandi fortreyt fyri góðum úrslitum.

Hjá StÍF man tað kennast eitt sindur tungt, at tær nú eru á fimta plássinum, tá farast skal undir endaspælið, men hóast hetta, so er munurin upp til oddin bert trý stig, so enn stendur alt opið.

Og so verður eisini spennandi at síggja, hvussu tað fer at tørna út fyrsta umfarið í endaspælinum. Tá fær StÍF vitjan av oddaliðnum úr VB, og kastar tann dysturin stig av sær, sær alt brádliga meira ljóst út. Samstundis fær Stjørnan vitjan av VÍF, so møguliga fer hetta umfarið at geva eina góða ábending um, hvussu liðini eru fyri, nú farast skal undir endaspælið, har stigini av álvara telja.

### Dysturin í tølum

**StÍF-Stjørnan 17-22 (8-14)**

Málskjúttar:
StÍF: Asta Petrauskiene 7(3), Sunfríð B. Jacobsen 3(1), Poula D. Olsen 2, Anna Maria Berthelsen 2, Signhild Petersen 1, Anna B. Danielsen 1
Stjørnan: Natasha Stamekovic 7, Bára S. Klakstein 6, Danjela Ercevic 5, Davina Sundskarð 2, Una Olsen 1, Irdi Mikkelsen 1
Brotskøst: StÍF 6, Stjørnan 1
Útvísingar: StÍF 1, Stjørnan 6
Dómarar úr Tjaldur: Trygvi Mortensen & Kári Hansen

## 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 12 | 9 - 0 - 3 | 298 | 257 | 41 | 18 |
| 2 | VÍF | 12 | 8 - 0 - 4 | 280 | 221 | 59 | 16 |
| 3 | Stjørnan | 12 | 7 - 1 - 4 | 260 | 256 | 4 | 15 |
| 4 | Kyndil | 12 | 6 - 0 - 6 | 294 | 293 | 1 | 12 |
| 5 | StÍF | 12 | 5 - 1 - 6 | 278 | 293 | -15 | 11 |
| 6 | Neistin | 12 | 4 - 2 - 6 | 239 | 254 | -15 | 10 |
| 7 | Tjaldur | 12 | 1 - 0 - 11 | 238 | 313 | -75 | 2 |

Tjaldur-Kyndil 27-30 (14-17):

# Kyndil nærkast málinum

**Við einum teprum sigri á Tjaldri tykist tað loksins, sum um Kyndil er um at koma á beint, soleiðis at kósin kann setast móti ætlaðu heiðursmerkjunum**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fyri kvinnurnar hjá Kyndli man kappingarárið í mangar mátar hava verið eitt stórt vónbrot higartil í ár. Eftir tvey sera lak ár, har liðið enntá hevur verið í beinleiðis niðurflytingarvanda, skuldi skútan rættast upp í ár. Hópurin sá á pappírinum sera sterkur út undan kappingarbyrjan, og tó at tað ikki varð sagt so hart, so varð flestu staðni teska um, at nú skuldi kósin setast moti heiðursmerkjum.

Fyrstu nógvu umførini hevur tað tó verið so sum so, tá tað hevur rátt um at hildið fast í hesum máli. úrslitini hava sveiggjað úr tí sera góða til tað heilt vánaliga, og eitt nú gekk meira enn mánaður, har einastu stigini, sum liðið fekk, vóru tey fýra, sum vórðu vunnin frá VÍF!

## Gekk javnt á

Nú er tó líkt til, at ein lítil vend er komin í. Kanska fyrst og fremst tí liðið nú hevur vunnið tvær ferðir á rað, men eisini tí talan í báðum førum hevur verið um sigrar uttan fyri Havnina.

Sunnudagin var tað Tjaldur, sum stóð fyri framman. Ein dystur, sum kanska á pappírinum skuldi verið hampuliga léttur, men tað er tó einki at ivast í, at Kyndil tók dystin í álvara, eftir at Tjaldur vann fyrru uppgerðina millum liðini.

Tað skuldi eisini vísa seg, at gestirnir høvdu alla orsøk at taka tær gulu í álvara. Tað allar mesta av fyrra hálvleiki leikaði sera javnt á, men eftir at Kyndil seint í hálvleikinum fekk trý mál á rað, tóktist tað, sum um tær høvdu lagt sjógv ímillum.

Tjaldur gav seg tó ongantíð. Sigurin á Kyndli í fyrra dystinum hevði helst eisini givið teimum trúnna uppá, at tað kundi bera til at venda dystinum, og tó at Kyndil hevði leiðsluna allan seinna hálvleik, so slepti heimaliðið ongantíð. Nakrar ferðirnar varð munurin minkaður niður í eittans mál, og eina lítla løtu stóð enntá á jøvnum, men nærri enn tí sama komu tær ikki. Kyndil megnaði hvørja ferð at svara aftur, soleiðis at leiðslan varð varveitt og stigini fingin til høldar.

## Eru væl við

Við teimum báðum stigunum, sum dysturin gav, hevur Kyndil nú vunnið seg upp á fjórða plássið í kappingini við tólv stigum. Tað merkir við øðrum orðum, at tær bert eru trý stig eftir oddinum, tá farast skal undir endaspælið, og hetta er í øllum førum eitt væl betri útgangsstøðið, enn tað var fyri bara tveimum vikum síðani.

Hjá Tjaldri er støðan ikki heilt so bjørt. Hóast munurin nú verður skorin í helvt, so eru tær framvegis fýra stig aftan fyri næst niðasta liðið, og sum úrslitini hava verið í grundspælinum, so kann tað vísa seg at gerast tungt at vinna nakað aftur. Hinvegin hevur grundspælið eisini víst, at liðið kann bíta nakað frá sær, og fáa tær hampuliga skjótt eina »succes-uppliving« í endaspælinum, so kann væl vera, at tær brádliga fáa luft undir veingirnar aftur. Ein ógvuliga týðandi dystur í so máta verður longu í fyrsta umfarinum, tá Neistin kemur á vitjan. Heldur óvæntað eru tað tær bláu úr høvuðsstaðnum, sum eru á næst niðasta sessinum, og kann munnurin til hesar minkast til tvey stig alt fyri eitt, fer botnstríðið brádliga at síggja spennandi út.

### Dysturin í tølum

**Tjaldur-Kyndil 27-30 (14-17)**

Málskjúttar:
Tjaldur: Lenka Ribaric 11(4), Milica Ergic 10, Mona Langgaard 2, Oddvá Fossdalsá 1, Hansa Mikkelsen 1, Heidi Heinesen 1, Kristine Ellingsgaard 1
Kyndil: Lotte Sørensen 9(4), Ann Mari Vang 8, Sonja Smiljic 4, Annika Ljósstein 3, Marjun Tróndarson 2, Iliana Manolescu 2, Heidi Maria Akselsen 2
Brotskøst: Tjaldur 5, Kyndil 6
Útvísingar: Tjhaldur 3, Kyndil 2
Dómarar úr H71: Jákup Símun Simonsen & Hallur Danielsen





*Eftir eina heldur laka byrjan, hevur VÍF nú av álvara fingið ferð á. Ikki minst er tað í verjuni, at meistaraspælið er funnið fram aftur*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

VÍF-VB 32-20 (16-9):

# VÍF vil verða best

**Enn er VB á odda í bestu kvinnudeildini, men leygardagin undirstrikaði VÍF so dyggiliga, at stendur tað til tær, so er bert ein spurningur um tíð, áðrenn hetta er søga**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Toppdystur var á skránni í Vestmanna leygardagin, tá VB kom á vitjan. Undan dystinum var støðan tann, at VB undir øllum umstøðum fóru at gerast fremstar í grundspælinum, men úrslitið hevði tó stóran týdning fyri báðar partar. Spurningurin, sum skuldi avgreiðast, var, hvørt tað skuldu verða eitt ella trý stig millum liðini bæði, tá farið verður undir endaspælið.

## Sorl

Og tað verður eitt stig. Lat tað verða sagt beinanvegin, at VÍF snøgt sagt hølvaði VB ígjøgnum, og eftir dystin mundi størsti spurningurin vera, hvussu tað yvir høvur ber til, at VÍF ikki longu er fremsta liðið í deildini. Somikið stórur var munurin.

Frá fyrsta bríksli var tað VÍF, sum setti dagsskránna. Í eini roynd at bremsa VÍF-álopunum hevði VB annars gjørt sær greitt, at Sóley Mikkelsen skuldi takast úr spælinum, men hóast hetta, so sást alt fyri eitt, at hetta ikki fór at verða nóg mikið til at steðga gula herinum. Hóast álopsspælið hjá VÍF til tíðir hevði lyndi at gerast heldur rótut, nú vanligi spælskiparin ikki fekk gjørt sítt, so fekk liðið sýnt, at tær so sanniliga eisini hava onnur vápn. Ikki minst riggaði tað væl at toyggja spælið, soleiðis at eyka rúmdin, sum mansverja gevur, kundi gagnnýtast við gjøgnumbrotum og fríspælingum, og í verjupartinum fingu tær fleiri ferðir bremsað VB, soleiðis at eyðkenda kontraspælið kundi koyra.

## Besta málverjan

Og so slepst heldu ikki undan at nevna, at VÍF framvegis eigur besta málverjan – um ikki leikaran – í føroyskum kvinnuhondbólti. Manuela Stan hevur tey bæði seinastu árini verið ein av høvuðsorsøkunum handan einaveldið hjá VÍF, og leygardagin sýndi hon so, hvussu trupult hon kann gera tað hjá mótstøðuni, tá lagið er í topp.

Álopsspælið hjá VB varð fyri tað mesta lagt tætt inn ímóti VÍF verjuni, og hetta gav á sín hátt eisini bonus. Í øllum førum fingu tær ofta skapt óskil í verjuspælið, og meira enn ta einu ferðina gav hetta úrslit í fríspælingum, sum VÍF oftast steðgaði á ólógligan hátt. Sum rætt var, so spurdust eisini fleiri brotskøst burtur úr hesum, men so heldur ikki meira. Av sjey brotskøstum, sum VB fekk í fyrra hálvleiki, eydnaðist bert at skora upp á tvey. Hini tók Manu sær av, umframt at hon eisini tók fleiri aðrar skotroyndir. Sagt á illa forbronglaðum føroyskum máli, so psykaði hon VB-kvinnurnar í somikið stóran mun, at tær at enda skutu mest sum í blindum, soleiðis at rumenski málverjin uttan stórvegis hóvasták kundi lesa skotroyndirnar av.

## Mistu móti

Longu í steðginum var munurin í málum somikið stórur, at ivin um endaliga úrslitið skuldi verið burturbeindur, og tað var eisini sjónligt, at so var, tá liðini komu aftur á vøllin.

Ein kundi kanska hildið, at VB nú í øllum førum fór at stríðast av øllum alvi til tess at avmarka tapið, men fyrstu løtuna sást millum lítið og einki til hetta. Hinvegin tóktist, at tær høvdu mist alla vón um at fáa eitt bara líkinda úrslit burturúr. Mansverjan av Sóley var nú eisini slept, soleiðis at eisini hon kundi seta sín vanliga dám á spælið, og tað var sjónligt, at hetta var nakað, sum hon hevði glett seg til.

Kanska var júst hendan spæligleðin hjá Sóley eisini eyðkennið fyri gongdini hjá VÍF seinastu vikurnar. Eftir ein tunga byrjan, har tvífaldu greipuvinnararnir høvdu ilt við at sannføra um, hví tær hava verið so einaráðandi. Og har saknurin í Ioanu Rápa kanska eisini var heldur stórur, hevur lagið verið eitt heilt annað seinastu dystirnar. Venjingarstøðan tykist framvegis vera hin besta í landinum, soleiðis at tær altíð kunnu stríðast til seinasta bríksl, og við einum einstøkum undantakið hava tær sett øll hini liðini upp á pláss seinsatu vikurnar. Enn eru tær kanska ikki fremstar, men leygardagurin staðfesti í øllum førum, at fremsti favoritturin til gullið aftur í ár spælir í gulum blusum.

Hinvegin eigur ikki at gloymast, at tað framvegis er VB, sum er á odda í deildini, og tí vilja tær ivaleyst eisini hava eitt orð at siga, tá tosast skal um gull og heiður. Grundstøðið til góðu støðuna løgdu tær fyrru helvt av grundspælinum, tá tær fingu fulla úrtøku, meðan úrtøkan hevur verið heldur misjøvn síðani. Hetta botnar tó eisini í, at kappingin í kvinnudeildini er javnari og harðari í ár, enn hon hevur verið fleiri av undanfarnu árunum. Her hevur VB fram um hini liðini megnað at koppa teimum teimum dystunum, har tað hevur riðið um snarið, til egnan fyrimun, og megna tær at varveita tann eginleikan, so eiga tær als ikki at avskrivast. Nakað langt ífrá. Men leygardagin vóru tær altso ikki meira enn næstbest. Har stóð VÍF á tí mesta, og so má stigatalva vera stigatalva.

### Dysturin í tølum

**VÍF-VB 32-20 (16-9)**

Málskjúttar:
VÍF: Sóley Mikkelsen 7(4), Jacklin Durhuus 7, Nikolina Eyðbjørnsdóttir 4, Nicoleta Radu 4, Hertha Simonsen 3, Fríða Marjunardóttir 3, Alis Høghamar 2
VB: Daiva Tuomaite 6(1), Reda Kurkaskiene 6(1), Laila Jespersen 3, Arnley Hjelm 2, Eydis Kjærbo 1, Anja Magnussen 1(1), Guðrun Midjord 1
Brotskøst: VÍF 6, VB 9
Útvísingar: VÍF 1, VB 2
Dómarar úr Neistanum: Kristian Johansen & Sámal Hansen. Hóast smávegis lýtir altíð kunnu finnast, so høvdu teir fult tamarhald á dystinum frá byrjan til enda.